# ...s útvalda fólk«

**Samvitskuleys krígsførsla**

Vit í Evropa ásanna og taka á okkum stóru ábyrgdina fyri døkku lagnuna hjá jødum, fyri vanæruligu happingini, pogromunum og Holocaust. Søguliga og moralskt var tað neyðugt at jødarnir fingu egið heim. Men staturin Ísrael hevur við síni samvitskuleysu krígsførlsu og ræðuligu vápnum lamløstað sín egna legitimitet. Hann hevur á skipaðan hátt gjørt seg inn á fólkarættin, altjóða semjur og eitt ótal av ST-samtyktum og hann kann ikki vænta verju frá sama staði. Staturin hevur teppibumbað heimsins viðurkenning. Men óttast ikki! Neyðartíðin er skjótt farin afturum. Staturin Ísrael hevur havt sítt Soweto....

**Uttan verju, uttan skræðu**

Máttu andi og orð blást apartheid-múrarnar yvir enda. Staturin Ísrael er ikki longur til. Hann er nú uttan verju, uttan skræðu. Mátti heimurin tí sæð náði í teimum sivilu. Tí tað er ikki teimum sivilu einstøku menniskjunum, sum okkara dómaprofeti er vend ímóti.

Vit ynskja øllum fólkinum í Ísrael alt gott, men vit taka okkum rættin til ikki at eta Jaffa-appelsinur, so leingi tær smakka illa og eru eitraðar. Tað gekk jú væl at liva í nøkur ár uttan tær bláu apartheid-drúvurnar.

**Blóðhevndarinnar aftursvar**

Vit góðtaka ikki orðalagið hjá statinum Ísrael. Vit viðurkenna ikki ónda spiralin av harðskapi og blóðhevnd við "eyga fyri eyga og tonn fyri tonn"... Tvey túsund ár er farin síðan ein jødiskur rabbinari fanst at hesi avgomlu lærusetningi um "eyga fyri eyga og tonn fyri tonn".

Hann segði: "Alt tað, sum tit ynskja onnur skulu gera fyri tykkum, skulu tit eisini gera fyri teimum". Vit góðtaka ikki ein stat, sum stríðist á antihumanistiskum prinsippum og á leivdunum á eini arkaiskari tjóðartrúgv og krígstrúgv....

Vit góðtaka ikki tað gamla Dávidsríkið sum regluskipandi fyri Miðeystur í 21. øld. Ein jødiskur rabbinari helt fyri tvey túsund árum síðan uppá, at Guds ríkið ikki er ein krígssinnað uppreisn av Dávidsríkinum Guðs ríki er innan í okkum og ímillum okkum. Guds ríki er miskunnsemi og fyrigeving...

**Sáttligt lag og miskunn**

Vit viðurkenni ikki statin Ísrael. Ikki í dag, ikki skrivandi stund, ikki í sorgarog vreiðisløtuni. Um øll ísraelska tjóðin skuldi fallið av egnari skuld og partar av fólkinum vóru noydd at flýggja úr sínum hertiknum økjum og aftur til enn eina útlegd, so siga vit: máttu umstøðurnar víst teimum sáttligt lag og miskunn. Til allar tíðir er tað ein brotsgerð at gera seg inn á flóttarfólk og statsleys...

Skjót ikki eftir flóttafólkum, miðjið ikki eftir teimum! Sum sniglar uttan skel, sárar karavanur av palestinskum og libanskum flóttafólkum, verjuleysar kvinnur, børn og gomul í Qana, Gasa, Sabra og Shatila. Gev teimum ísraelsku flóttafólkunum húsarúm, gev teimum mjólk og honning!

Lat ikki eitt ísraelskt barn gjalda við lívinum. Alt ov mong børn og sivil eru longu myrd.

---

**Í viðmerking til Sosialin, skrivar formaðurin í føroysku Ísraelsmissiónini, Frants Jensen:**



– Eftir endirstovnanina av Ísrael í 1948 hava nógv kríggj verið, og eitt av høvuðsendamálunum hjá flestu av fíggindum Ísraels, sum hava tikið til vápnamegi, hevur verið at "strika Ísrael av heimskortinum". Eisini í hesum nýggjasta stríðnum hevur Hizbollah havt hetta endamálið. Hamas, ið herfyri vann stjórnarvaldið í teimum palestinsku økjunum, hevur sama endamál. Ikki er lætt at byggja álit og heldur ikki varandi vápnahvíld, tá ið støðan er so fíggindalig millum stríðandi partarnar. Og her er eisini neyðugt at síggja, at tað er ikki bara annar parturin, ið er skurkur. Ísrael eins og teirrra fíggindar hava gjørt og gera framvegis nógvar brotsgerðir hvør móti øðrum…

Tað er ikki nøkur einføld loysn at fáa varandi frið millum Ísrael og tess grannatjóðir. Frá okkum, ið sita í friðarliga Vesturevropa, koma ymsar skriviborðsloysnir, men tað er rættiliga avmarkað, hvat kann brúkast av teimum, tí støðan er nógv meiri fløkjaslig, enn vit geva okkum far um bæði hernaðarliga, mentunarliga, søguliga og átrúnaðarliga.

*Hann endar sína viðmerking við hesum orðunum:*

Hóast støðan sær trupul út, so er tað tó ein, ið veruliga kann skapa frið millum Ísrael og tess arábisku grannatjóðir. Tað er friðarhøvdingin, sum í "Friðarstaðnum" (Jerúsalem) fyri 2000 árum síðani lat lív sítt fyri at skapa frið millum øll menniskju.

Jødar eins og arábar hava brúk fyri at hoyra henda boðskapin. Tí eiga vit eisini at vera við at boða gleðiboðskapin um Jesus bæði í Ísrael og øllum tess arábisku grannatjóðum.

---

# Tað má vera mark fyri møsni



KRONNIKKUR

*Carl Jóhan Jensen*

Kríggj er sorgarleikur, sama hvørjar umstøðurnar eru. Oftast hava vit ikki hilling á, hvat stríðið stendur um, tak eitt nú harmleikin í Kekkenia. Ein heil tjóð hevur verið slættað niður og vit taka (og hava leingið tikið) alt við akslayppum og knappliga tað. Sama kann sigast um onnur kríggj, sum hava staðið við í ártíggjur eitt nú á Sri Lanka, í Sudan og aðrastaðni.

Men hví nertir kríggið í Miðeystri øðrvísi við okkum enn onnur kríggj. Hvussu bert tað til, at hjartað alt í einum vil kippast upp í hálsin, tá ið myndir birtast á skíggjan av samanbrestum við og innan fyri Libanska landamarkið. Satt at siga kemur orrustan, sum nú stendur við Miðjarðarhavsbotn, ikki uppímóti grimdarstríðnum í Kekkenia í djevulskapi og grimd.

Verri enn so.

Svarið er so einfalt, sum tað er særsøkið. Tað fellur í tríggjar og ein hálvan part. Her taka vit fyrst fyri tríggjar teir fyrstu partarnar fyri: olju, heimsveldasøgu og samvitsku (hálvpartin drýggja vit til seinni).

Um oljuna er at siga, at ófriður, serliga bráðkomin ófriður, vil trýsta prísin á hesi neyðsynjarvøru upp og hægri oljuprísur sæst ólagaliga skjótt aftur bæði í lands- og vanligum húsarhaldi.

Men heimsveldasøgan? Soleiðis sum hon tók seg upp eftir seinna heimsbardaga við køldum kríggi og øllum, sum har uppií hekk, var tað ikki at undra, at meginbrotrivan millum eystur og vestur kom at ganga gjøgnum miðeystur við øllum tí oljutilfeingi, ið har er. Upp ígjøgnum hálvtrýssini skákaðu viðurskiftini í miðeystri sær so, at amerikanarar ongastaðni fingu høgligari fótafesti við Miðjarðarhavsbotn enn í Ísrael, sum á henda hátt gjørdist ein miðdepil í heimspolitikkinum á jøvnum føti við t.d. Vestur-Berlin. Hvør spenningsbroyting í økinum, sjálvt hin minsta kundi føra til vopnaðan samanbrest, men samanbrestur í sínum lagi skjótt enda við heimskríggið og tað var eisini um reppið fleiri ferðir, eitt nú undir oktoberkrígnum í 1973. Heima á klettunum, her so at siga alt var forborgið, sum hevði við útheimin at gera, vóru fá tó so óflættiliga blind, at tey ikki sóu, at slíkt skaðabrot, sum heimskríggj óumberliga er, fór at geva okkum ein heldur geislavirknari lut í ævinleika enn tann, sum fráboðaður var á guðstænastum og møtum. Tískil sótu og sita føroyingar enn sum á nálum, verður Miðeystur nevnt í ófriðarhøpi.

Men samvitska, meðni? Hvussu kemur samvitska upp í alt hetta?

Lat meg beinanvegin taka fram, at eg í hesum sambandi ikki hugsi um persónliga samvitsku, men felags-samvitsku, eina samhaldsfasta samvitsku so at siga, t.e. eina sam-evropeiska samvitsku, ið eyðvitað eisini er sam-kristin samvitska (t.e. samvitska við støði í kristnum siðareglum). Henda samvitska hevur havt meiri at siga fyri samlagið millum Ísrael og onnur miðeysturlond enn mangan kanska grunar. Í tvey túsund ár traðkaði kristin dómur á gýðingin, traðkaði hann niður úr allari virðing og ætlaði honum lagnu og stað uttan fyri gildisøki hjá samvitsku síni. Í úti við tvey túsund ár fann kristin trúgv ongar áneyðir at skammast um atferð sína móti gýðinginum. Hann átti alt uppiborið, alt uttan lív og rætt. Ikki fyrr enn portrini í týskum týningarlegum brádliga vórðu tveitt upp á bak á vári í 1945, tástani skammaðist hon og skammaðist við lít. Kolsvørt samvitska vildi nú ikki bert umbera gýðingin, men eisini fáa honum eitt heim, eitt ríki fyri seg sjálvan og eingin kærdi seg minsta vet um, at umnevnda ríkið varð stovnað í einum landi, sum onnur tjóð longu hevði bygt í næstan tjúgu øldir (ella ið hvussu er eitt hálvt ártúsund longri enn nøkur tjóð hevði búð í Mið- og Norður-Evropa). Og hin sam-evropeiska/kristna samvitskan hevur verið drúgv at blikna aftur. So drúgv, at trýss ár eftir at sortin legðist yvir hana, trekast Evropa enn við og vil heldur umbera Ísraelsríki enn tala at teimum, ið har ráða fyri borgum, hóast skilagrundir mangan hava verið fyri tí tey seinnu árini.

Men nú til hálvpartin, ið eg tók frá í byrjanini.

Tað er hetta serliga lagið, ið ger vart við seg í føroyskum hugburði og orðaskifti um viðurskiftini í Miðeystri. Eg hugsi um tað vestanhavsættaða (og himprist ikki við at siga eitraða samblandið) av bíbliugrundaðari pátrúgv og víðgongdum høgrasjónarmiðum, ið summi her á landi (Guð má vita hvat tey billa sær inn) rópa upp á trúgv.

Her er av sonnum ein ormur komin í garð okkara. Hesin ormurin (og hann trilkast í hvørjum) ringir seg tætt um vit og skil og lokkar menn við ongum øðrum grundarlagi til støðutakan enn heilaspuna, at gera seg kjaftbreiðar um viðurskifti, sum teir hvørki hava ella leggja í at hava nakað innlit í. Vit hava sæð hetta ljóta lagið eitt nú í kjakinum um tey samkyndu. Vit hava sæð tað í endurtiknum atløgum at treingja um frælsið hjá tí einstaka við boðum og bannum. Vit síggja og hoyra tað dag um dag í almennu fjølmiðlum okkara, sum munnu vera millum teir mest niðurbundnu og troystarleysu í vesturheiminum (t.d. kann dastið av teimum bókmentum, ið skrivaðar eru eftir 1850 ikki lesast í útvarpi Føroya orsakað av sensuri). Og nú síggja vit tað so aftur, ið meginparturin av Miðjarðarhavsbotni liggur í heljarskugga. Teir kjaftbreiðu ganga og darta við sínum skriftstøðum, rópa sína skammleysu óvitan út um allar geilar og unna teimum hvørki náði her ella handan, ið ikki vilja taka við orði teirra. Teir umbera alt, sum valdsmenn í Ísrael taka sær fyri, hvussu víkir og vendir. Fegnast um hvørja bumbu, ið fellur á libanskar bygdir, um hvønn palistinskan ungdóm, sum liggur eftir á. Upplýsing, sum hevur uppruna aðrastaðni enn í teirra skammlopnu heilatrævum, skýra teir at vera frá Fananum. Og Fanin er allastaðni, hvat tá: í CNN, í BBC, í DR, í NRK, í SVR, í Kringvarpinum, ja í hvørjum javnvigaðum sjónarmiði, sum fram kemur um tað, sum fer fram við Miðjarðarhavsbotn í hesum døgum.

Sjálvur troysti eg mær illa at taka dagar ímillum, hvør ið rættin hevur í stríðnum millum Hissbolla og Libanon øðrumegin og Ísraelsríki hinumegin. Kríggj hava ta natúr, at rætt og skeivt vil kámast tí meiri, sum bardagin verður harðari og longri.

Eg sigi bara: tað má vera mark fyri møsni.